# Ingeborg Vinther stúrir ikki fyri dómi

**Nú kunnu fakfeløg ikki longur krevja, at at arbeiðsgevarar bara skulu hava limir í fakfelag í arbeiði, men tað gevur ikki forkvinnuni í Føroya Arbeiðarafelag vøkunætur**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Fara arbeiðsgevarar í Føroyum at gera sær dælt av støðuni, verður ruðuleiki á arbeiðsmarknaðinum og tað hava arbeiðsgevarar ongan áhuga í. Tí fer tað at tæna teimum best at varðveita støðuna sum hon er, sigur Ingeborg Vinther*

– Hesum stúri eg ikki so illa fyri.

Ingeborg Vinther, heldur ikki, at tenninar verða trektar úr fakfeløgunum, hóast ein dómur nú er staðfestur á allarhægsta stigi, sum kann tulkast sum eitt álvarsligt bakkast fyri fakfelagsrørsluna.

Altjóða mannarættindadómstólurin í Haag hevur nevniliga staðfest, at ongin kann krevja, at løntakari skal vera limur í einum ávísum fakfelag.

Tað merkir samstundis, at tað er ólógligt at partarnir á arbeiðsmarknaðinum gera avtalur sum siga, at arbeiðsgevari bara kann hava limir í ávísum fakfelag í arbeiði. Hetta er tað, sum á fakmáli nevnist ekslusivar avtalur.

Sum sæst í aðrari grein her á síðuni, metir arbeiðsgevarafelagið, at hesin dómur kemur eisini at ávirka Føroyar.

Føroya Arbeiðarafelag er nógv størsta fakfelag í landinum og tað hevur ekslusivan sáttmála við arbeiðsgevararnar. Tað merkir at í teimum økjum, sum eru umboðað av Føroya Arbeiðarafelag, skulu øll arbeiðsfólk verða limir í arbeiðarafelagnum.

Hetta er ein avtala, sum arbeiðarafeløgini hava hildið ógvuliga fast um og tað er meiri enn so komið til skarpskeringar og hevur elvt til arbeiðssteðgir, tá ið arbeiðsfólk ikki hava verið limir í rætta felagnum.

### Rykkir ikki teppið undan

Men Ingeborg vinther heldur ikki, at úrskurðurin í mannarættindadómstólinum í farnu viku, fer at rykkja teppið undan undan fakfeløgunum.

Tí hóast hon ikki stúrir so illa fyri avleiðingunum, heldur hon kortini, at talan er um eitt sera týdningarmikið mál, sum fakfeløgini fara at taka upp til viðgerðar.

Enn er dómurin kortini so nýggjur, at fakfeløgini hava ikki havt stundir at viðgerða hann enn.

Men hon heldur ikki, at hetta fer at føra til tær stóru broytingarnar.

– Tað fer tíðin at vísa, hvørja ávirkan hetta fer at fáa í Føroyum. Fakfeløgini fara í øllum førum altíð at krevja, at rættindini hjá limunum ikki verða skerd. Tað verður eitt krav, sum vit ikki fara at víkja frá.

### Tænir báðum pørtum best

Annars heldur hon ikki, at tað fer at vera nakar vinningur hjá arbeiðsgevarunum at máa støðið undan fakfeløgunum.

– At arbeiðsfólk eru limir í fakfelag ger, at arbeiðsmarknaðurin er væl skipaður og ein vælskipaður arbeiðsmarknaður tænir øllum pørtum, eisini arbeiðsgevarunum. Fara arbeiðsgevarar at taka fólk í arbeiði, sum ikki eru limir í fakfelag, verður ruðuleiki á arbeiðsmarknaðinum og tað er avgjørt ikki teimum til fyrimunar. Sáttmálarnir binda jú eisini arbeiðsfólki til at ganga undir ávísar treytir og tí fer tað at føra til óskil, um fólkið ikki longur skal verða skipað í felag.

Ingeborg Vinther leggur afturat, at tað, at øll arbeiðsfólk eru í einum felag, ger, allir at arbeiðsgevarar mugu rinda somu løn og annars arbeiða undir somu treytum í allar mátar.

– Fara arbeiðsgevarar at taka fólk í arbeiði, sum ikki eru skipað í felag, kann tað henda, at arbeiðsgevarar fara at undirbjóðað hvønn annan og tað kann fullkomiliga avlagað kappingina ímillum teir einstøku arbeiðsgevararnar og tað verður ein stórur vansi fyri teir. Tí er tað eisini til fyrimunar fyri arbeiðsgevararnar, at vit hava skipað viðurskifti, sigur Ingeborg Vinther.

Ingeborg Vinther sigur, at hóast mannarættindadómstólurin í Haag hevur felt ein dóm, eru hetta viðurskifti, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at loysa við samráðingum sínamillum og honfrábiðjur sær politiska uppílegging.

# Føroyar mugu taka avleiðingar av altjóða dómi

**– Tað fer eisini at virka føroyska arbeiðsmarknaðin, at mannarættindadómstólurin í Haag hevur staðfest, at tað er ólógligt at krevja, at løntakarar skulu vera limir í fakfelag**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hvørki Ingeborg Vinther ella Jan Mortensen, vænta, at úrskurðurin í mannarættindadómstólinum í Haag, fer at fáa tað stóru ávirkanina í Føroyum, tá ið samanumkemur*

– Tað skal vera sjálvboðið um ein løntakari er limur í fakfelag ella ikki.

Tað er niðurstøðan í einum dómi, sum nú er felagur í altjóða mannarættindadómstólinum í Haag.

Eisini føroyar eru fevndar av mannarættindadómstólinum og tí ávirkar ein slíkur dómur eisini arbeiðsmarknaðin í Føroyum.

Og Jan Mortensen, stjóri Vinnuhúsinum staðfestir, at hetta er eitt mál, sum arbeiðsgevararnir fara at taka upp, tí mannarættindadómstólin eiga vit at halda.

Tað fara teir at gera næstu ferð, samráðingar vera næsta vár.

– Vit meta, at hetta er eitt mál ímillum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Men megna vit ikki at loysa tað, er tað ein spurningur, hvat politiski myndugleikin ger, tí tað er hann, sum hevur ábyrgdina av, at vit halda mannarættindasáttmálan.

### Væntar ikki stórar broytingar

Annars heldur stjórin í Vinnuhúsinum ikki, at hetta fer at fáa tær stóru broytingarnar.

– Onkur kann hugsa, at hetta fer at gera tað torført hjá fakfeløgunum at fáa fólk at seta seg sum limir. Men eg vænti tað ikki, tí tað hevur eisini stórar fyrimunir at vera limur í fakfeløg, tí tey hava jú bæði lívstrygging, eftirlønarskipanir og aðrar sosialar skipanir.

Tað kann eisini hugsast, at arbeiðsgevarar fara at leggja arbeiðsfólk undir trýst og at tey fara at royna at trýsta lønina niður. Serliga í kreppustøðum sum í nítiárunum við stórum arbeiðsloysi, kann onkur hugsa, at arbeiðsgeavarar fara at trýsta fólk til at melda seg úr fakfelag og at arbeiða fyri undirløn. Tann, sum ikki letur seg kroysta, kann altíð sigast upp, tí tað standa altíð nógv fólk, sum eru klár at taka arbeiðið

Men tað stúrir Jan Mortensen heldur ikki fyri.

– Vit hava øll ein stóran fyrimun av at hava ein vælskipaðan arbeiðsmarknað. Ein vælskipaður arbeiðsmarknaður hevur stóran týdning, tí tað vísir seg, at har arbeiðsmarknaðurin ikki er so vælskipaður, elvir til størri arbeiðsloysi. Men tað merkir ikki, at vit kunnu stavnsbinda fólk, sum vit gera nú.